## Samstarv hóast politiskur kuldi



Granskingarsamstarvið millum Noreg og Rusland í Barentshavinum er gott og óbroytt, hóast uttanríkispolitiska veðurlagið millum Rusland og NATO er vorðið kaldari, og Rusland er hildið uppat við øllum hernaðarligum samstarvi við NATO-lond. Norskir og russiskir havgranskarar arbeiða nevniliga í tøttum samstarvi, nú ársins átak í Barentshavinum er fyri. Enn er óvist, um politiska stríðið fer at fáa nakrar avleiðingarnar fyri samstarvið millum londini um Barentshavið, har sivil og hernaðarlig før sigla um hvørt annað undir bjargingaruppgávum, marknaðareftirliti og vaktarhaldi á fiskileiðum. Á norska Havgranskingarstovninum eru tey fegin um, at einki er broytt millum londini higartil, tá ræður um granskingarsamstarv í Barentshavinum. Í hesum døgum eru norsk og russisk havrannsóknarskip í holt við ársins størstu og mest umfatandi kanning av havumhvørvinum. Endamálið við átakinum er einki minni enn at kanna støðuna hjá økoskipanini í øllum tí ísfría partinum av Barentshavinum. *(-vilmund)*

# í Fuglafirði

skipinum, sum tók í grótið.

Farmaskipið tók ikki sjógv inn, og eingin olja var at síggja rundan um skipið.

Trupulleikarnir í Fuglafirði hendan dagin vóru, at bjargingarfólkini høvdu tíðina og sjóvarfallið ímóti sær, tí tað var fjarandi sjógvur, og ivasamt var, um skipið kom út úr aftur grótkastinum, meðan tíð enn var.

Út á seinnapartin í gjár varð bíðað eftir sleipibátinum, Thor Goliat, og tá hesin um seytjanda tíma kom á Fuglafjørð, settu Thor Goliat, Ziska og Pilot á kypriotiska farmaskipið, sum eftir lítlari løtu fekst leyst úr grótkastinum í øllum góðum.

- Russiski skiparin á kypriotiska farmaskipinum var serliga bangin fyri skrúvuni á skipinum. Hann hevði hug at bíða, til sterkari kreftir vóru til sleip, og tá Thor Goliat kom á staðið og setti á skipið aftan, samstundis sum Ziska og Pilot settu á framman, gekk væl at toga skipið út frá.

Tað sigur Jóhan Clementsen, brandmeistari í Fuglafirði.

Hann vísir á, at tað var nógvur sunnanvindur í Fuglafirði, tá skipið varð hálað út úr aftur grótkastinum.

- Tað stóð nógv á, men tíbetur eydnaðist at loysa skipið í øllum góðum.

Forline 1 liggur nú undir Vónavirkinum. Hol er á bulbustevninum, og helst er okkurt prus eisini á skipssíðuni, sum lá ímóti grótinum.

- Vit halda ikki, at onnur hol eru á skipinum enn holini á bulbustevninum, sum tó eru omanfyri vatnlinjuna, nú skipið ikki hevur last, sigur Jóhan Clementsen.

Brandmeistarin í Fuglafirði sigur, at Forline 1 hevur 300 tons av tungolju umborð, og tí kundi ein størri dálkingarvanlukka staðist, um hol kom á skipið, meðan tað lá og gnaddaði móti grótkastinum.

- Næraberg, sum hevur eitt pelatrekk upp á eini 100 tons, hevur ligið klárur í allan dag, men skiparin umborð á farmaskipinum var kanska í so varin, helt Jóhan Clementsen, tá ið vit høvdu hann í telefonini beint eftir, at farmaskipið í øllum góðum varð lagt til bryggju undir Vónavirkinum.

Ziska, Pilot og Thor Goliat hava eitt pelatrekk í part, sum liggur millum eini 12 og 17 tons.

Fuglafjarðar Sløkkilið hevði tryggjað sær oljusperrur, um olja fór at leka úr skipinum, men hesar vórðu ongantíð lagdar út.



*Líkt er ikki til, at Forline 1 hevur fingið stórvegis skaða, men hol er á bulbustevninum*

*Mynd: Høgni Thomsen*



*Alt, sum hevur eina byrjan, hevur eisini ein enda. Her verður gamla Krúnborg, sum kom í 1973, høgd upp sum gamalt jarn*

# Gamla Krúnborg sum gamalt jarn

**Eingin stjørna er stjørna allan dagin, og flaggskipini hava eisini sína tíð**

UPPHØGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Einki stendur í stað og allarminst tíðin. Alt, sum hevur eina byrjan, hevur eisini ein enda. Soleiðis er eisini við okkara fiskiskipaflota. Gomul skip og bátar hava sína tíð, tó at summi kunnu sigla og fiska í 100 ár ella meira.

Sluppin Ester var um 100 ára gomul, tá menninir, sum við henni vóru, drógu snellurnar fyri seinastu ferð.

Men tað er undantakið.

### Upphøgging

Ein lesari hevur sent okkum myndir av gomlu Krúnborg, sum varð smíðað í Noregi í 1973.

Skipið – ella tað, sum tá var eftir av skipinum – stendur á skipasmiðju í Frederikshavn í Danmark, har tað verður høgt upp og selt sum gamalt jarn.

Enn sást navnið Krúnborg á hekkuni og heimstaðurin Tórshavn.

Gamla Krúnborg fór úr føroyska fiskiskipaflotanum í 1999, tá ið Eiler Jacobsen, reiðari, læt nýggju Krúnborg byggja. Skipið, sum fór av bakkastokki í 1999, eitur nú Fagraberg og er heimahoyrandi í Fuglafirði.

Tað var skipasmiðjan Westcon (West Contractors) í Ølensvåg í Noregi, sum tók gomlu Krúnborg í býti við nýbygningin, ið skipasmiðjan smíðaði fyri reiðaran.

### Gamalt jarn

Petur H. Jacobsen, sonur Eiler Jacobsen, sum vit høvdu í telefonini í morgun, var bert trý ára gamal í 1973, tá gamla Krúnborg fór av bakkastokki í Ulstein í Noregi.

- Mær vitandi seldi West Contractors ongantíð skipið aftur, men skipasmiðjan kann síðan hava selt skipið sum gamalt jarn, nú tað verður høgt upp.

Hann sigur, at Eiler førdi Krúnborg, tá hon kom, og hann veit eisini at siga, at millum aðrar skiparar, sum loystu pápan av, vóru eitt nú Agga í Garðastovu, sáli, úr Vestmanna.

- Krúnborg var upprunaliga kraftblokkaskip, sum fiskaði sild, makrel og lodnu, men tá svartkjafturin kom fyri, fór skipið eisini at trola, sigur Petur H. Jacobsen.

# Fiskivinna tjenar minni

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hóast danskir fiskimenn fiskaðu 10% meira fyrra hálvár í ár, minkaði bruttoinntøkan kortini somu 10% í mun til fyrra hálvár í fjør. Tilsamans fiskaðu donsk skip og bátar fyri 1.226 miljónir krónur fyrra hálvár í ár.

Bruttoinntøkan hjá skipum og bátum, sum fiska matfisk, var fyrra hálvár 916 miljónir krónur, sum er 73 miljónir krónur minni enn fyrra hálvár í fjør. Í nøgd var talan um ein vøkstur upp á 4%, men miðalprísurin lækkaði við 11%.

Hjá ídnaðarvinnuni var bruttoinntøkan 287 miljónir krónur, sum er ein minking upp á 13%. Landaðu nøgdirnar øktust 17%, men miðalprísurin lækkaði við heili 26%.